Seinka› grundlógarnevnd

Jóannes Eidesgaard vil hava at vita, um Høgni Hoydal fer at broyta lógina um grundlógarnevndina, nú nevndin er farin langt út um ásettu tí›arfreistina

FØROYSK GRUNDLÓG
Magnus Dam

Hóast grundlógarnevndin langt sí›ani skuldi veri› li›ug vi› uppskoti› um eina føroyska grundlóg, so er langt eftir á mál. Sambært lógini um grundlógarnevndina frá í februar í fjør, skal nevndin vera li›ug vi› arbei›i sítt í seinasta lagi 1. juni í 2000.

Nevndin er sostatt seinka› gó›ar sjey mána›ir, og Jóannes Eidesgaard, løgtingsma›ur, vil tí hava at vita, um lógin ikki eigur at ver›a broytt. Hetta spyr hann Høgna Hoydal, landsst‡rismann, um í einum fyrispurningi.

– Tí›arfreistin er ikki hildin, og hóast long tí› enn gongur, á›renn naka› uppskot fer at liggja á bor›inum, so hevur landsst‡ri› ikki sett fram uppskot til broytingar av greinini, sum fyriskrivar tí›arfreistina. Ta› kann tykjast heldur løgi›, at grundlógararbei›i› sjálvt leggur út vi› ikki at halda landsins lógir, sigur Jóannes Eidesgaard í vi›merkingunum.

Sambært heimasí›uni hjá grundlógarnevndini, so kann nevndin halda fram, hóast sjálv lógin ikki ver›ur broytt. Løgtingi› kann velja at gó›taka, at nevndin fer út um tí›arfreistina, men løgtingi› kann eisini vi› lóg longja tí›arfreistina og seta eina n‡ggja freist. Jóannes Eidesgaard vil eisini hava at vita, hvat hendir vi› st‡risskipanarlógini, um ein føroysk grundlóg ver›ur sett í gildi. Eitt nú, hvussu mannagongdin er, um st‡risskipanarlógin skal takast av.

Skal st‡risskipanarlógin broytast, so skulu tvey løgting samtykkja broytingarnar, og Jóannes Eidesgaard vil hava at vita, um ta› eisini skulu tvey løgting til at gera av, um lógin skal takast av.

Í samband vi› n‡ggja fullveldisleistin ætlar landsst‡ri›, at Føroya fólk um nøkur ár skal atkvø›a um n‡ggju grundlógina. Ver›ur hon samtykt, so merkir ta› samstundis, at Føroyar eru fullveldisríki. Jóannes Eidesgaard spyr í hesum sambandinum Høgna Hoydal, hvussu hetta fer at seta sín dám á innihaldi› í grundlógini. Fjór›i spurningurin hjá Jóannes Eidesgaard sn‡r seg um, hvat hendir vi› grundlógini, um Føroyar ikki ver›a fullveldisríki. Javna›artingma›urin vil hava at vita, um úrsliti› av grundlógararbei›inum møguliga vi› einari útbygging av st‡risskipanarlógini kann vera grundarlag undir einari a›rari ríkisrættarligari loysn enn fullveldi.

Løgtingi› samtykti í gjár, at Høgni Hoydal skal svara fyrispurninginum frá Jóannesi Eidesgaard.

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

petur & petur 320870

Skeiðdeildin

Skeiðdeildin á Føroya Sjómansskúla skipar fyri eftirútbúgving av sjómonnum

Skeiðætlanin fyri 1. hálvár 2001

ARPA

Byrjar 2. januar — 4 dagar — kr. 7.000
Byrjar 27. februar — 4 dagar — kr. 7.000
Byrjar 30. apríl — 4 dagar — kr. 7.000

GOC (generelt certifikat sum radiooperatørur)

15 dagar — kr. 9.900

GMDSS-endurnýggjan

Byrjar 19. februar — 5 dagar — kr. 5.900

Olju-, gass- og kem. 1. partur (Tanker Safety)

Byrjar 19. mars — 5 dagar — kr. 4.500

Flutningur av vandamiklum evnum

Byrjar 13. mars — 4 dagar — kr. 3.500

Arbeiðsumhvørvi (§16)

Byrjar 27. februar — 4 dagar — kr. 4.000
Byrjar 5. mars — 4 dagar — kr. 4.000
Byrjar 30. apríl — 4 dagar — kr. 4.000
Byrjar 7. mai — 4 dagar — kr. 4.000

ISM-byrjunnarskeið

Byrjar 26. apríl — 2 dagar — kr. 2.500

VHF-skeið

Byrjar 5. mars — 5 dagar — kr. 2.000

Øll skeiðini eru dagskeið, og undirvísingin fer fram á skúlanum kl. 8-15. Tó er VHF-skeiðið kvøldskeið. Skúlin hevur møguleika at skipa fyri øðrum skeiðum, umframt nevndu skeið til aðrar tíðir. Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

Tilmelding á tel 31 1749 ella sg@farnav.fo

Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, søfartsstyrelsen og IMO

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 311749
Fax +298 318122
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

Heilsuverk i› undir sjóneykua

Fáa brúkararnir nóg gó›a tænastu frá almanna- og heilsuverkinum? Hetta skal eitt n‡tt rá› finna útav og samstundis gera uppskot um, hvussu almanna- og heilsuverki› skal skipast í framtí›ini

TRIVNA‹ARRÁ‹
Magnus Dam

Hvussu tryggja› vit, at føroyingar fáa tí bestu tænastuna frá almanna- og heilsuverkinum, og hvussu skal hetta stóra øki› skipast í framtí›ini? Hetta skal n‡ggja Trivna›ar- og heilsurá›i› finna útav vi› at leggja alt almanna- og heilsuverki› undir sjóneykuna.

Landsst‡riskonan í almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, hevur lagt uppskot fyri løgtingi› um n‡ggja Trivna›ar- og heilsurá›i›. Løgtingi› samtykti í vár, at eitt tílíkt rá› eigur at ver›a sett at hyggja at føroyska almanna- og heilsuverkinum, og sambært uppskotinum hjá Helenu Dam á Neystabø fær rá›i› umlei› eitt ár at gera eina gjølliga frágrei›ing um alt almanna- og heilsuverki›.

Rá›i› skal útgreina og gera uppskot um eina langtí›arætlan fyri at tryggja, at stø›i› í almanna- og heilsuverkinum er á einum høgum og nøktandi stø›u.

Umfatandi arbei›i

Talan er um sera rúgvismiki› útgreiningararbei›i, og arbei›i› hjá rá›num skal skipast í smærri bólkar. Hvør bólkur skal taka sær av einum ávísum øki. Ta› kann til dømis ver›a at hyggja at umstø›unum hjá breka›um, teimum gomlu í samfelagnum, børnum og ungdómum og menningartarna›um.

Rá›i› skal so taka samanum og gera eina frágrei›ing til í seinasta lagi 31. desember næsta ár um, hvussu almanna- og heilsuøki› skal skipast.

Trivna›ar- og heilsurá›i› skal samstarva vi› Almanna- og heilsumálast‡ri› og feløg og áhugabólkar á teimum ymsu økjunum – Eldrará›i›, Rá›i› fyri breka›, Sjúkrahúsrá›ini og onnur.

Fimm limir skulu veljast í rá›i›. Ein limur skal umbo›a heilsuøki›, tríggir almannaøki›, og fimti limurin skal hava serligt innlit í almanna- og heilsuvi›urskifti.

N‡ggi Smyril eitt líti› sindur seinka›ur

Smyril hevur veri› áliti› hjá su›uroyingum nú í fjór›ingsøld. Nú er ætlanin at byggja n‡ggjan Smyril. Eftir ætlan skuldi arbei›i› at projektera hann, ver›a li›ugt í dag, men nú ver›ur ta› ikki fyrrenn ta› er komi› naka› út í januar

Arbei›i› at projektera n‡ggja Su›uroyarskipi›, skuldi ver›a li›ugt í dag, men ta› ver›ur ta› ikki.

SU‹UROYARSKIP
Áki Bertholdsen

Ta› er nú greitt, at tí›arætlanin, sum var› sett til at byggja n‡ggjan Smyril, fer ikki at halda heilt. Men fráviki› í tí›arætlanini, ver›ur kortini ikki stórt

Eftir ætlanini, skuldi arbei›i› at projektera ta› n‡ggja su›uroyarskipi› ver›a li›ugt í dag.

Men ta› ver›ur ta› ikki.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, sigur, at ta› ver›ur ikki fyrrrenn vit eru komin naka› út í januar, at arbei›i› at projektera skipi›, ver›ur li›ugt.

So talan er ikki um nakra nevniverda seinking.

Strandfer›slustjórin sigur, at talan er um eina so stóra verkætlan, at ta› hevur allarstørsta t‡dning at fyrireika arbei›i› væl fyri at úrsliti› skal vera so gott sum gjørligt.

– Tí halda vit, at ta› er skeivt at streingja á fyri at fáa arbei›i› li›ugt til ásetta dagin, tí avlei›ingin av tí kann ver›a, at alt ver›ur ikki nóg væl gjøgnumhugsa›.

– Vit halda, at ta› hevur nógv størri t‡dning at fáa skipi› lagt so væl til rættis sum gjørligt og tí hava vit gjørt av, at ta› skal taka ta› tí, sum ta› krevur.

Strandfer›slan heldur , at hetta fer eisini at gera arbei›i› bæ›i lættari og bíligari í longdini.

Og orsøkin til, at skipi› er seinka›, er júst ta›, at ta› eru ymsir lutir í skipinum, sum skulu vi›gerast gjølligari.

Annars sigur hann, at arbei›i› gongur hampiliga væl.

Umbo› fyri Knud E. Hansen, sum er felagi› i› projekterar skipi›, hava veri› í Føroyum í hesi vikuni, og t‡sdagin kunna›i Strandfer›slustjórin og umbo›ini fyri Knud E. Hansen, vinnumálast‡ri› um arbei›i› higartil.

Tí›indaskriv

Lyktakanning 2000

Rá›i› fyri Fer›slufrygd skipa›i vikurnar 42 og 43 fyri fer›sluátakinum »Lyktakanning 2000«, har lagt var upp til, at bilførarin sjálvur kanna›i, um ljósini vóru í lagi.

Næstu tvær vikurnar, 30. oktober til 12. november 2000, gjørdi løgreglan sokalla›ar grein 13 kanningar um alt landi›. Samla›a úrsliti› var at:

	1998	1999	2000
Løgreglan í Havn kanna›i	1596	2391	923 akfør
Løgreglan í klaksvík kanna›i	447	461	359 akfør
Løgreglan í Runavík kanna›i	299	510	915 akfør
Løgreglan í Vestmanna kanna›i	40	21	72 akfør
Løgreglan í Mi›vági kanna›i	117	268	77 akfør
Løgreglan í á Sandi kanna›i	123	214	81 akfør
Løgreglan á Tvøroyri kanna›i	243	292	400 akfør

Ella samanlagt 2827 akfør í 2000. ikki øll akførini vóru í lagi. 298 rapportir vóru skriva›ar, har talan var um:

	1998	1999	2000
ljósini ikki vóru í lagi	121	280	113
ikki brúkt trygdarbelti›	89	116	141
ikki koyrikort hjá sær	101	164	95
dekkini ikki í lagi	3	23	16
ikki n‡tt fallhjálm	0	0	2
ov nógv fer›	3	0	6
rúsdrekkakoyring	1	1	0

Bøturnar komu samanlagt uppá 101.925 krónur

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

petur & petur 320870

Útbúgving

Nú er tíð at søkja um upptøku

Við eini útbúgving frá Føroya Sjómansskúla liggja øll heimsins høv opin fyri tær. Lærugreinarnar fevna um siglingarfrøði, skipstøkni, lastaviðgerð, samskifti, veðurfrøði, skipsfyrisiting, leiðslu og samstarv, maskinfrøði, samfelt skipsræði, føroyskt, enskt, danskt, rokning, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, digitaltøkni, sjórætt, virkisbúskap, sjóreglur, heilsufrøði, fiskivinnu, teld, umframt ymisk skeið.

Heimaskipari

1. hálvár — 2. hálvár

Skipari

3. hálvár

Skipsførari

4. hálvár
5. hálvár — 6. hálvár

Skúlin byrjar mikudagin 3. januar 2001
Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan

Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 311749
Fax +298 318122
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo